

# HALLÓ



## Ómenniskjansligt av Rósu Samuelsen

Hetta er ómenniskjansligt av Rósu Samuelsen ímóti okkum!

So hvassorðað er starvsfólkið á Suðuroyar Ellis- og røktarheimi í brævi, tey fara at senda landsstýriskvinnuni í almannamálum í dag.

Starvsfólkið á heiminum hevur havt fund um ætlanina hjá landsstýriskvinnuni.

Sjálvi kalla tey fundin fyri ein kreppufund.

Rósa Samuelsen ætlar at átta tveymannakømur skulu gerast til einmanskømur og tí skulu upp til 15 starvsfólk sigast upp.

Men onki verður ikki sett í verk, fyrren endalig boð eru komin frá landsstýriskvinnuni.

- Hvussu longi ætlar tú at halda starvs- og búfólk á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi á pínubonkinum, spyrja tey Í juli komst tú út í fjølmiðlarnar við einum skrivi um sparingar. Nú hava vit 9. septembur, og enn er einki ítøkiligt hent hesum viðvíkjandi. - Hetta er ómenniskjaslig framferð tú brúkar móti okkum. Vit krevja at fáa greitt svar beinanvegin, tí støðan á okkara arbeiðsplássi er ótolandi, sigur starvsfólkið.

# Vælgagnist




Íslendski forsætismálaráðharrin og kona hennara komu, sóu og fóru avstað aftur

## Í MORGIN




Um morgunin upp í ein struk av útsynningi, men annars lot til andøvsgul av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

## SUNNUDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men út á seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og um kvøldið regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

## MÁNADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul up í hvassan vind av útnyrðingi, mikudagin møguliga skrið. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. við Írland kemur hendavegin og dýpist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Føroyar fer norðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

8. sept Tendring/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 10. sept | 08:39 | 21:05 | 07:39 | 20:05 | 07:54 | 20:20 | 10:39 | 23:05 | 11:39 | - | 06:54 | 19:20 | 05:54 | 18:20 | 08:54 | 21:20 | 09:54 | 22:20 | 08:24 | 20:50 | 09:39 | 22:05 |
| 11. sept | 09:31 | 21:57 | 08:31 | 20:57 | 08:46 | 21:12 | 11:31 | 23:57 | 00:05 | 12:31 | 07:46 | 20:12 | 06:46 | 19:12 | 09:46 | 22:12 | 10:46 | 23:12 | 09:16 | 21:42 | 10:31 | 22:57 |
| 12. sept | 10:24 | 22:51 | 09:24 | 21:51 | 09:39 | 22:06 | - | 12:24 | 00:57 | 13:24 | 08:39 | 21:06 | 07:39 | 20:06 | 10:39 | 23:06 | 11:39 | - | 10:09 | 22:36 | 11:24 | 23:51 |
| 13. sept | 11:18 | 23:45 | 10:18 | 22:45 | 10:33 | 23:00 | 00:51 | 13:18 | 01:51 | 14:18 | 09:33 | 22:00 | 08:33 | 21:00 | 11:33 | - | 00:06 | 12:33 | 11:03 | 23:30 | - | 12:18 |
| 14. sept | - | 12:12 | 11:12 | 23:39 | 11:27 | 23:54 | 01:45 | 14:12 | 02:45 | 15:12 | 10:27 | 22:54 | 09:27 | 21:54 | 00:00 | 12:27 | 01:00 | 13:27 | 11:57 | - | 00:45 | 13:12 |